# Prestur flytir inn í februar

**Útlit eru nú endiliga fyri, at hvalbiarprestur kemur aftur í Leirar at búgva. Væntandi verður prestagarðurin klárur at flyta inn í fyrst í komandi ári, sigur biskupur**

BÚSTAÐARVIÐURSKIFTI
*Edvard Joensen*

Gongur tað, sum biskupur vónar og væntar, verður aftur ljós í prestagarðinum í Leirum í februar mánaða komandi ár. Men tá gongur eisini á triðja ári, síðan prestur flutti út.

Tað hevur tikið sína tíð at umvæla prestagarðin í Hvalba. Arbeiðið upp á prestagarðin er vorðið rættiliga nógv meira umfatandi, enn nakar hevði hugsað sær til. Og pengarnir eru smáir, sigur Hans Jacob Joensen, biskupur.

Ætlanin var ikki frá byrjan, sigur biskupur, at arbeiðið í Leirum skuldi gerast so umfatandi, sum tað nú er vorðið. Nú er tað vorðið til eina fullkomuliga renovering av prestagarðinum. Frá kjallara til loft.

Men húsini vóru í rættiliga ringum standi. Í fyrsta lagi eru tey ongantíð gjørd liðug. Eitt nú loftið hevur staðið óinnrættað, síðan garðurin varð bygdur.

Fyri skjótt nógvum árum síðan varð kortini nógv gjørt við húsini, men tað var í ávísum førum ikki nóg væl úr hondum greitt, so alt mátti gerast umaftur nú. Eitt nú vóru gólvini ikki bjálvað, sum tey skuldu, og máttu tí takast upp aftur og gerast av nýggjum.

Til fyri heilt stutt síðani hevur eftirlitið við føroysku prestagørðunum ligið í Danmark, og tí ikki verið so nøktandi, sum ynskiligt er, vísir biskupur á. Tað kann eisini vera ein grund til, at okkurt er sloppið undan viðmerkingum, sum átti at verðið átalað.

Tað stórarbeiðið, sum nú verður gjørt, kostar eisini hareftir, sigur hann. Higartil man tað liggja rættiliga nær eini millión krónum, sum brúktar eru til umvælingina í Leirum.

Av hesum eru einar 300.000,- krónur brúktar bara til drening rundan um husini. Har var so vátt, at tað rann inn í kjallaran, og fyri at fáa hann turran, var neyðugt við stórarbeiði rundan um húsini.

At tað hevur tikið langa tíð, kemst fyri ein part av fíggjarligu umstøðunum, sigur Hans Jacob Joensen, biskupur. Hann greiðir frá, at Stiftið fær 1,2 milliónir krónur árliga til viðlíkahald av føroysku prestagørðunum. Av hesum skulu 25% aftur í landskassan sum meirvirðisgjald. So tað sigur seg sjálvt, at ikki verður nógv í part til 17 prestagarðar.

At fleiri teirra so eisini eru gamlir og partvís ikki í serliga góðum standi, hjálpir ikki upp á støðuna.

Biskupur ásannar, at tað saktans hevði verið møguligt at gjørt prestagarðin í Hvalba lidnan beinanveg. Men so var einki - avgjørt einki - oyra eftir til allar hinar prestagarðarnar. Og tað ber stutt og greitt ikki til. Tí má vera sum er.

Sum er eiga danir prestagarðarnar, og føroysku prestarnir búgva so til leigu. Peningurin til viðlíkahaldið av prestagørðunum kemur úr Danmark, og okkurt er, sum bendir á, at ávís viðurskifti í Føroyum gera, at danir ikki eru so øgiliga altráir eftir at sleppa av við pengar til prestagarðarnar í Føroyum í løtuni.

Eitt dømi er tann vantandi prestagarðurin á Glyvrum. Tann trupulleikin verður helst loystur við, at Føroya Landsstýri keypir eini hús, sum so verða leigað aftur til prestagarð.

– Tí kunnu vit saktans liva við, sigur biskupur. Tí tað ger væl tað sama, hvørjum vit leiga frá, tá vit skulu leiga kortini.

Men nú er tað kortini komið so mikið áleiðis, sigur hann, at endi fer at sígjast á arbeiðinum nakað skjótt. Fíggingin er avgreidd fram til nýggjárs. Og so verður sett av tað, sum brúk er fyri, soleiðis at klárt kann vera at flyta inn í prestagarðin í Leirum aftur ikki seinni enn í februar komandi ár, væntar biskupur.


Tað er rættiliga nógv, sum verður tikið niður og sett upp aftur í prestagarðinum í Leirum í Hvalba

Mynd: Edvard Joensen

## Prestaskifti í Suðuroy


Prestaskifti verður á Tvøroyri í heyst. Petur Martin Rasmussen gevst, og Jónsvein Bech kemur aftur

Mynd: Edvard Joensen

**Petur Martin Rasmussen leggur frá sær fyri aldur, og Jónsvein Bech flytir aftur til Tvøroyarar í heyst**

PRESTASTØRV
*Edvard Joensen*

Tvørafólk fáa nýggjan prest um allahalguna. Tá kemur Jónsvein Bech suður aftur at loysa Petur Martin Rasmussen av. Petur Martin Rasmussen leggur frá sær fyri aldur.

Petur Martin Rasmussen fyllir 70 ár í september, og skal tí úr starvinum. Hann gevst alment tann 30. september, men fer úr starvinum um hálvan august, tá hann fer í summarfrí.

Tann 1. november tekur avloysarin so við. Tað er Jónsvein Bech, sum ikki er ókendur í prestagarðinum á Tvøroyri. Har var hann prestur, áðrenn hann fór inn á Nes. Nú kemur hann so »heimaftur«.

At Jónsvein Bech ikki kemur suður fyrr enn ein mánaða eftir, at Petur Martin Rasmussen er farin, kemst av, at hann skal hava konfirmatión í Nes Prestagjaldi í oktober.

Eisini í Vági skal nýggjur prestur setast. Erland Beder, sum hevur virkað sum avloysaraprestur í Vági í umleið eitt ár, gevst allahalgunadag.

Starvið er lýst leyst, og umsóknarfreistin er úti nú um mánaðarskiftið. Enn er eingin umsókn komin, sigur Hans Jacob Joensen, biskupur. Men hann hevur tó tosað við einar tríggjar prestar, sum hava spurt seg fyri, sigur hann.

Tá Jónsvein Bech fer av Nesi, verður tað starvið eisini leyst at søkja. Enn er ikki lýst, sigur biskupur, men væntar hann, at tað verður fyrsta dagin.

# Ein røða um land og fólk

**Bjarti Mohr fer ikki at halda nakra politiska røðu, tá hann fer at seta ólavsøkuna. Eina vanliga ólavsøkurøðu, kallar hann hana**

ÓLAVSØKA
*Edvard Joensen*

Tað verður ein røða um mentan, søgu og fólkið, sum her býr, sum Bjarti Mohr fer at halda, tá hann fer at seta ólavøskuna í ár.

Bjarti Mohr sigur við Sosialin, at hann er ikki rættiliga liðugur við røðuna enn. Men politikkur verður als ikki blandaður uppí, sigur hann.

Hann ætlar at gera hampiliga skjótt av. Tað er sjálvdan, at fólk tíma at lurta eftir longum røðum, og verður veðrið vánaligt, sum veðurmenninir hesaferð hótta við, er skilagott at gera skjótt av, sigur Bjarti Mohr.

Bjarti Mohr sigur, at hann hevur onga grundgeving fingið fyri, hví hann er biðin um at halda setanarrøðuna. Og tað kann eisini vera tað sama. Men hann tekur tað sum eina sera stóra æru at sleppa at seta ólavsøkuna, sigur hann.

Annars ætlar Bjarti Mohr sær at halda eina heilt vanliga ólavsøku. Sum hann plagar, og sum so mong onnur fólk gera.

Kappróðurin fer hann at síggja. So er tað steypafinalan í Gundadali. Og sum trúgvur B36’ari er eingin ivi um hvørjum hildið verður við. Og til eydnuhjólið í KFUM verður farið hvørt einasta ár, sigur Bjarti Mohr, sum samstundis nevnir, at hann framvegis kennir seg líkasum eitt sindur heima í KFUM, síðan hann sum smádrongur plagdi at koma til dreingjafundirnar hjá Álvheygg.


Bjarti Mohr



# Innkrevjingin verður broytt

**Fíggjarmálastýrið ætlar at broyta innkrevjingina av pengum til Barsilsskipanina, so arbeiðsgevarar fáa longri freist at gjalda og ikki verða kravdir eftir teimum minstu upphæddunum**

INNKREVJING
*Eyðun Klakstein*


*– Tað loysir seg ikki at krevja smáar upphæddir inn, og tað bara irriterar fólk, sigur Petur Alberg Lamhauge*

Innkrevjingin av pengunum til nýggju Barsilsskipanina verður eftir øllum at døma broytt, so sleppast kann undan støðum, sum rættiliga eru falnir arbeiðsgevarum fyri bróstið.

Í gjár greiddi Sosialurin frá einum dømi, har ein arbeiðsgevari varð kravdur eftir einari krónu til Barsilsskipanina, men skuldi gjalda 100 krónur í avgreiðslugjaldi, so at samlaða rokningin gjørdist 101 krónu.

– Fíggjarmálastýrið ætlar at gera eitt bagatellmark, soleiðis sum tað verður brúkt í sambandi við aðrar skattir og avgjøld. Hetta ger, at vit ikki fara at krevja arbeiðsgevarar eftir upphæddum, sum tað ikki loysir seg at krevja inn, sigur Petur Alberg Lamhauge, sum er aðalstjóri í Fíggjarmálastýrinum.

### Leingja freistina

Við hesum sipar aðalstjórin til, at tað er eingin orsøk at krevja arbeiðsgevarar eftir einari krónu, soleiðis sum dømi í Sosialinum í gjár vísti.

– So smáar upphæddir loysir tað seg ikki at fara eftir, og tað bara irriterar fólk. Orsøkin til at hetta sokallaða bagatelmarkið ikki er við í skipanina, er tí skipanin varð gjørd í skundi. Men ætlanin er at broyta hana, sigur Petur Alberg Lamhauge.

Hann heldur ikki, at innkrevjingin er ódámlig. Hinvegin vísir hann á, at innkrevjingin er grundað á eina lóg, sum Vinnumálastýrið hevur gjørt.

– Vit hava enntá linkað treytirnar hjá arbeiðsgevarunum í okkara kunngerð, so teir fingu valmøguleikan millum at gjalda pengarnar til Barsilsskipanina beinanvegin ella at fáa rokning, sigur Petur Alberg Lamhauge.

– Arbeiðsgevarar fáa við hesum kreditt, og teir hava síðani sjey dagar at gjalda rokningina í. Hendan freist er tó heldur stutt, og landsstýrismaðurin umhugsar at leingja hana.

### Summir gjalda ikki

Aðalstjórin í Fíggjarmálastýrinum sigur, at avgreiðslugjaldið í Barsilsskipanini, sum er 100 krónur fyri hvørja rokning, er sett til eina upphædd, sum svarar til veruliga kostnaðin av at krevja pengarnar inn.

– Okkara royndir í innkrevjingini vísa, at ein triðingur av arbeiðsgevarunum rindar ikki pengarnar beinanvegin, og tí má eitt slíkt gjald leggjast afturat, tí tað kostar at umsita innkrevjingina, sigur Petur Alberg Lamhauge.

Hann heldur, at allir arbeiðsgevarar rindaðu rokningarnar til tíðina, so var eingin orsøk at hava eitt høgt avgreiðslugjald.

## Eftir sjúkum fraklendingi

Mánakvøldið flutti nýggja bjargingartyrlan hjá Atlantsflogi ein mann av fronskum trolara á Landssjúkrahúsið.

Tað var um hálvgum sjey tíðina mánakvøldið, at MRCC Tórshavn boðaði frá, at franska skipið Albert Granet hevði hjálp fyri neyðini.

Hóast sýnið var vánaligt, fór trylan hjá Atlantsflog avstað, og tað tók 41 minuttir at flúgva út til Alberg Granet.

Bjargingarmaður varð loraður niður á dekkið á skipinum, og síðani tók tyrlan bæði sjúklingin og bjargingarmannin upp. Tað gingu 14 minuttir frá tí, at tyrlan kom á staðið, til hon hevði fingið sjúklingin umborð.

Franski sjómaðurin varð fluttar á Landssjúkrahúsið, og hann hevur tað gott.

Føroyska bjargingartyrlan, sum kom til landið flaggdagin, hevur verið boðsend 10 ferðir í sambandi við bjarging ella sjúkraflutning.

**ek**

